LANDSROYND 6. FLOKKUR

mai 2009

## Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir millum skrástrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Loyvt er næmingunum at hava við sær til royndina orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í vanligu undirvísingini í føroyskum í 6. flokki)

**Drós situr** við **telduna./ Hon er inni á** Facebook./ **Vinkonur** hennara **hava** / leingi **flent eftir** henni, / tí hon ikki **leggur** / so **nógv í teldur**, / og tær **hava / allar reypað** av, / **hvussu nógv** vinfólk, / **tær hava á** Facebook./
**Drós legði** í fyrstani / **ikki lag í**, / **hvat** tær s**øgdu**, / **men** sum **vikurnar** gingu, / og tær **prátaðu** / um **øll** vinfólkini, / **føldi hon seg** uttanfyri./
Sólja, **besta** vinkona hennara**, / lovaði at hjálpa** henni í gongd, / **og nú situr** hon / við **telduna** / eins og **allar /** hinar **genturnar** í flokkinum. / **Hon følir**, / **at hon** nú / **er við** í prátinum **aftur**, / og hon **hevur / longu fingið** nógv vinfólk / úr ymsum **bygdum** í **Føroyum**. / **Hon hevur eisini** / vinfólk aðrastaðni **enn í Føroyum**, / t.d. **Jónas** úr Noregi, / **Helgu** úr **Íslandi** / **og Sáru** úr **Grønlandi**./ Hon **kennir** tey **øll**, / tí tey hava **øll** / fyrr **búð** í **Føroyum**./
**Drós hevur** gjørt av / **bara at fáa** sær vinfólk, / **ið hon kennir**, / tí hon **hevur** / so ofta **hoyrt**, / **at tað** kann **vera** vandamikið / **a**t samskifta **við** fremmand fólk / **á telduni**./ Hesi **kunnu** vera / **heilt** onnur, / **enn tey siga / seg vera**./
**Drós hyggur**, / um hon **hevur fingið /** nøkur **boð**, / men **tað** hevur hon **ikki**./ Hon **skrivar** eina **heilsan /** til **Sáru**, / **ið hevur** føðingardag, / **leggur seg** so **á sofuna** / at **hvíla** seg eina løtu, / **áðrenn** hon **skal / venja** flogbólt./ **Hóast** hon er / **glað** fyri **vinfólkini** á Facebook, / so er **tað stuttligari** / at **vera saman** við / veruligum **vinfólki**./
**Drós spælir** flogbólt / við **gentum** 12 **ár / hjá** SÍ./ **Henni dámar** sera **væl /** at **spæla** flogbólt./ **Liðið** hjá henni/ **hevur klárað seg** væl í kappingunum, / **sum hava verið**./ Tær **hava** ongantíð **vunnið**, / men hava tríggjar **ferðir /** verið nummar **tvey.** / **Drós hyggur altíð**, / tá ið bestu **liðini /** í bygdini **spæla**, / og hon var eisini í **Havn**, / **tá ið** kvinnurnar vunnu steypafinaluna./ Tað var ein **góður dagur** fyri bygdina./